# Connie Hedegaard greiða frá leikluti hjá Føroyum á COP15

Høgni Hoydal og Juliane Henningsen hava sett fram fyrispurning viðvíkjandi leiklutinum hjá Føroyum og Grønlandi á COP15 veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í desembur. Av tí, at ongin avtala er gjørd viðvíkjandi Føroyum og Grønlandi hava Juliane Henningsen og Høgni Hoydal hava tí sett soljóðandi fyrispurning: "Hvat kann ráðharrin upplýsa um tær avtalur sum eru gjørdar við Føroyar og Grønland, í samband við komandi samráðingarnar um ta nýggju veðurlagsavtaluna, sum skal viðtakast á COP15 í desember 2009?" Ætlanin við spurninginum, er at varpa ljós á luttøkuna hjá Føroyum og Grønlandi á COP15, umframt at skunda undir, at ein veruliga avtala verður gjørd. Ætlanin hjá donsku stjórnini er, at Føroyar og Grønland skulu gera eina innanhýsisavtalu við Danmark, heldur enn at vera partur av samlaðu avtaluni, og hetta vilja hvørki føroyingar ella grønlendingar finna seg í.






samanleggingin og flytingin niðan í Mjørkadal er heilt burtur við. Hetta hava vit víst á alla tíðina, og vit hava ongantíð tikið undir við hesi ætlan, siga tey.

### Sera óhøgligt

Lagt verður aftrat, at børn, sum eru komin á Rókina at búgva, skulu vera undir uppsýni alla tíðina.

- Vit fara við teimum allastaðni, og ikki fyrr enn vit halda, at tey umsíðir kunnu ferðast einsamøll, eitt nú í bussi, lata vit tey fara uttan fylgjara. Tað hevði tí verið ógvuliga óhøgligt alla tíðina at farið oman úr Mjørkadali og niðanaftur, tá vit skuldu út við hesum børnum, eitt nú til svimjing og aðrar aktivitetir í Havn.

Tað riggar ikki altíð at geva børnunum fríar treymar, men so verður roynt umaftur og umaftur.

Starvsfólk, sum ikki eru longur á Rókini, vísa á, at hugskotið við at hava stovnin nær býnum, er, at hesi børn og ung skulu kunnu verða við í tí sosiala lívinum, sum er.

- Nú skulu tey eftir uppskotinum hjá landsstýrinum beinast – burtur – niðan í Mjørkadal, og tað líkar okkum slett ikki, leggja tey aftrat.

### Ber ikki til

Fyrrverandi starvsfólkini siga, at tað snøgt sagt heldur ikki ber til, at børn og ung við so ymiskum trupulleikum skulu verða á einum og sama stovni.

- Eingin av okkum var fyri at leggja stovnarnar saman, og eingin av okkum var sinnaður at flyta niðan í Mjørkadal at hava ábyrgdina av hesum børnum, leggja tey dent á.

Fyrrverandi starvsfólkini vísa á, at meðan Rókin vanliga hevur havt børn, sum eru 14 ár og yngri, hevur Slóðin havt ung, sum eru 14 ár og eldri. Tó hava eisini tilkomnari børn verið á Rókini, og soleiðis er tað framvegis, nú tey fýra børnini, sum eru har í løtuni, eru millum 12 og 16 ár.

- Tey eldru eru fysiskt væl fyri; tey kunnu drekka, berjast, eru seksuelt aktiv, og onkur brúkar kanska eisini onnur rúsandi evni. Tí eru hesi slett ikki egnaði at búgva saman við 10-14 ára gomlum børnum, sum Rókin í fyrsta lagi er ætlað til, er greiða niðurstøðan hjá fyrrverandi starvsfólkum á Rókini, sum soleiðis gjørdu av at siga seg úr starvi.

# Rósa Samuelsen er ógvuliga hørm

**Landsstýriskvinnan, Rósa Samuelsen, sigur seg vera ógvuliga harma um nógv av tí, sum sagt varð í gjár um ætlaninar at leggja Rókina og Slóðina saman í ein samanlagdan stovn í Mjørkadali**

STOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg fari beint nú á fund um Slóðina og Rókina, segði Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, tá vit høvdu hana í telefonini í morgun.

Hon var fryntlig, men hevði ringa tíð, tá vit hittu hana eitt pinkalítið bil.

Meðan hon var á veg á fund, segði hon seg tó harmast um nógv av tí, sum sagt varð á løgtingi í gjár og um ymiskar útsagnir, sum vóru í fjølmiðlunum í gjár um Slóðina og Rókina, har børn og ungdómar húsast.

- Tit eru vælkomin at ringja eftir fundin ella at meyla til mín og seta mær spurningar.

### Tey sárbarastu

Rósa virkaði eitt sindur upprivin og ikki sørt særd hesa løtu.

- Vit skulu minnast til, at hetta eru tey sárbarastu børn og ungdómar, vit eiga. Mong av hesum hava ongan góðan, og vit skuldu fyri fleiri árum síðan havt tikið okkum betri av hesum fólkum, enn vit hava gjørt.

Rósa Samuelsen sigur tó ikki, at børn og ungdómur, sum eru og hava verið á hesum báðum stovnum, ikki hava havt tað gott og hava fingið tann kærleika, stuðul og hjálp frá teimum starvsfólkum, sum hava verið um tey.

- Men vit skuldu yvir eitt nógv longri áramál havt tikið okkum av nógv fleiri fólkum, ið hava havt ymiskar trupulleikar at drigist við – bæði børnum og ungdómum, legði hon aftrat.

### Eru ikki býtt

Landsstýriskvinnan vísir á, at umtalaðu børn og ung, sum hava verið og eru á hesum stovnum, hvørki eru menningartarnað, ei heldur býtt.

- Samfelagið eigur hesi fólk, sum eru tey mest sárbaru børn og ungdómur okkara, sigur Rósa Samuelsen, sum á veg á fund í morgun ikki hevði stórvegis stundir og hug at gera viðmerkingar til málið um hesar báðar stovnarnar, Rókina og Slóðina, nú tíðin kortini var so knøpp.

Men, legði landsstýriskvinnan aftrat, at Sosialurin kann altíð venda sær til hennara – eftir fundin ella í teldupostі.

Vit taka landsstýriskvinnuna upp á orðið og fara at venda okkum aftur til hennara.



*- Umtalaðu børn og ung, sum hava verið og eru á hesum stovnum, eru hvørki menningartarnað ella býtt. Samfelagið eigur hesi fólk, sum eru tey mest sárbaru børn og ungdómur okkara, sigur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum*